BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

2. juli 2025
Mál: 22/22133-135
Viðgjørt: NKR

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, nr. 52-117/2024 eftir § 52a í tingskipanini, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um prógvtøkuhættir í eini tíð við vitlíki.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar eru tær ítøkiligu avbjóðingarnar vegna vitlíki í skúlahøpi sambært landsstýrismanninum og hansara øki?
2. Er arbeiðið at endurskoða prógvtøkuhættir vegna avbjóðingar við vitlíki byrjað?
3. Hvør er tíðarkarmurin fyri broytingum í prógvtøkuhættum í eini møguligari endurskoðan, og í hvønn mun kann arbeiðið verða framt innan verandi játtan til økið?

Svar

Til spurning 1:
Í skúlahøpi kann vitlíki vera sera hent og munadygt hjálparamboð, men hetta er treytað av talgildisbúgving hjá bæði lærarum og næmingum. Við talgildisbúgving meinast í hesum førum at hava førleikar til at meta um og nýta vitlíki á ein viðkomandi og skynsaman hátt.

Okkara skúlaskipan leggur upp til, at næmingar í stóran mun arbeiða við skrivligum uppgávum uttan fyri vanligu undirvísingina, t.d. sum heimaarbeiði ella til skrivligar prógvtøkur. Á hesum økinum er vitlíki ein stór avbjóðing, tí tað er sera freistandi hjá næmingum at lata vitlíki svara uppgávuni fyri seg. Trupult er sostatt eisini hjá lærarum at vita, í hvønn mun næmingarnir hava avrikað sjálvir, ella um vitlíki hevur verið nýtt at svara uppgávuni heilt ella lutvíst.

Størstu avbjóðingarnar eru sostatt:

- At skipa skrivligt arbeiði, soleiðis at vitlíki gerst hent og munadygt hjálparamboð.
- At fáa meira ferð á tilgongdina at menna talgildisbúgving í skúlaverkinum, t.e. við námsætlanum, førleikamenning, tilfari, ráðgeving o.ø.
- At støðumet og prógvtøl í summum førum ikki eru eftirfarandi, eftirsum mettu avrikini ikki eru egnu avrik næminganna.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Til spurning 2:
Arbeiðið at endurskoða prótøkuhættir er byrjað. Fylgt verður við tí, sum rørir seg á hesum øki í grannalondum okkara, og roynt verður at menna hóskandi prótøkuhættir. Ávísar royndir eru gjørdar. Á Vinnuháskúlanum er port folie prótøkuháttur settur í verk, og fleiri skrivligar prótøkur eru gjørdar munnligar. Á miðnámi hevur verið skrivlig prótøka í summar, har næmingar einast kundu brúka pappír og blýant.
Próvstovan fyrireikar í løtuni royndarvirksemi við møguleika at royna nýggjan prótøkuhátt í ávísum lærugreinum í fólkaskúlanum komandi summar. Harumframt verður møguleikin kannaður at skipa munnliga prótøku á breytaverkætlanini, eins og aðrar royndir eru í umbúna.

Til spurning 3:
Arbeitt verður á fleiri økjum í løtuni, við tí endamáli at gera nakrar royndir, sum byggjast kann víðari á. Talan er um menningararbeiði, sum ikki bert fatar um prótøkuhættir, men eisini møguliga tillaging av undirvísing og førleikamenning av lærarum og próvdómarum. Ávísur tíðarkarmur er ikki settur, og í løtuni verður arbeiðið framt innan verandi játtan.

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður